## Húsavirðið ov høgt

Hús og íbúðir í Danmark hava als ikki tað virðið, sum tey eru mett til. Altjóða Gjaldoyragrunnurin, IMF, sigur í einari meting, at danska húsa- og íbúðarvirðið er 15 prosent oman fyri tað veruliga virðið. Búskaparfrøðingarnir hjá grunninum siga, at fellandi húsa- og íbúðarvirði saman við møguligum rentuhækkingum kann raka danska búskapin meint. Sambært IMF eru Spania og Frakland í at kalla somu støðu sum Danmark.




*Donsk hús hava als ikki tað virðið, sum tey eru mett til (Mynd: DR)*

# Kreppan í fiskiflotanum størri enn nakrantíð

**- Fiskiflotin er nú í so stórari kreppu, sum hann neyvan hevur verið í áður, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen**

FISKIFLOTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*





*Teir vilja ikki veita fiskiflotanum stuðul til olju, men hava einki ímóti at leggja stein omaná byrði hjá sethúsaeigarum – við oljuavgjaldi til landskassan*




Nú listaprísurin á olju til skipini táttar í 6 krónur fyri liturin, ásannar formaðurin í Reiðarafelagnum, Viberg Sørensen, at rættilig kreppa er í okkara fiskiskipaflota.

- Sum støðan er nú, mugu vit bara ásanna, at vit eru í eini so stórari kreppu, sum vit neyvan hava verið í áður, sigur hann.

### Eingin trolveiða

Herfyri var Reiðarafelagið á fundi við løgmann og fiskimálaráðharran, har hesir vórðu kunnaðir um støðuna í okkara fiskiskipaflota. Á fundinum greiddu umboð fyri ymisku veiðibólkarnar frá, hvussu torfør støðan í veruleikanum er.

- Ringast er í Suðuroynni, har flestu stóru trolararnir eru, men nú fara skip at verða løgd um alt landið. Tað ber snøgt sagt ikki til at dríva trolfiskiskap við so dýrari olju, sigur Viberg Sørensen.

Í grein á heimasíðu Reiðarafelagsins vísir formaðurin á, at fleiri av skipum okkara koma til lands full undir lúkurnar við fiski.

- Men tá reiðarin sær, at skipið, hann hevur ábyrgd av, hevur størri útreiðslur enn inntøkur ein slíkan túr, hevur hann einki annað val enn at binda skipið til bryggju.

### Manningartrot

Í greinini vísir formaðurin í Reiðarafelagnum á, at línubátarnir brúka minni olju, men hjá teimum er støðan ring vegna manningartrot.

Viberg Sørensen sigur seg kortini vóna, at nýggja útlendingalógin fer at bøta um støðuna hjá línubátunum.

- Vit mugu bara ásanna, at fiskiflotin hevur so stórar trupulleikar at dragast við, sum vit neyvan hava vitað um áður, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag.

Vit kunnu leggja aftrat, at

# Samkenslufjarrit til Hveragerði

**Hveragerði í Íslandi og okkara heimliga Nes kommuna eru vinarbýir, og nú Hveragerði varð rakt av jarðskjálvta, hevur føroyski vinarbýurin sent samkenslufjarrit**

SAMKENSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í vikuni rakti ein harður jarðskjálvti Ísland við miðdepli í Selfossi, sum liggur einar tríggjar kilometrar frá Hveragerði, ið er vinarbýur við Nes kommunu.

Nes kommuna hevur í hesum sambandi sent býráðnum í Hveragerði samkenslufjarrit.

Í fjarritinum verður ynskt kommunu og borgarum alt tað besta í komandi døgum.

- Vit vóna og biðja eftir, at tit koma væl burtur úr teimum skaðum, sum hava rakt býin, sigur kommunan í fjarritinum.

Á heimasíðuni hjá Nes kommunu siga tey seg hava frætt, at øll hava tað gott í Hveragerði, men nógvir bygningar hava fingið stóran skaða av jarðskjálvtanum.

Umboð fyri Nes kommunu vóru á vitjan í Hveragerði síðsta heyst, og tá er myndin tikin, sum vit prenta saman við hesum greinastubbanum.



*Borgarstjórin í Hveragerði, Aldis Hafsteinsdóttir og borgarstjórin í Nes kommunu, Símun Johannesen*

*Mynd: Nes kommuna*